Tekniskur Studentur (HT) | SIT, 1 ár ella 2 ár | Handverkslæra | Skúlaheim

# Tekniski Skúlin í Klaksvík

*– fjølbroyttar og liðiligar útbúgvingar*

við Víkina · FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 63 11 · www.tsk.fo

**Nútímans undirvísingarhølir:**

- kt-hentleikar
- royndarstovur
- miðlaverkstaður
- tónleikastudio
- fyrstafloks verkstøð







Sosialurin/KvR · 34 18 00



# Nú er møguleiki at søkja inn til **heilsuhjálparaútbúgvingina**

ið byrjar í august 2009

**Vit uppliva ofta, at næmingar, ið byrja á heilsuútbúgvingunum siga:**
»Tað, ið vit læra, er nakað heilt annnað enn vit høvdu ímyndað okkum – útbúgvingin er í veruleikanum meira spennandi enn vit hildu...«

Heilsuskúli Føroya



**Á Heilsuskúlanum brynja vit teg menniskjansliga og heilsufakliga til at taka tær av øðrum menniskjum, ið hava eitthvørt brek, sjúku ella ellisbrek. Tú lærir:**

- samskifti við onnur menniskju
- lívsvirðir, lívsformar, mentan og at brúka lívssøgu hins einstaka í røktini
- at virða sjálvsavgerðarrætt menniskjans og at arbeiða við egna hugburði og persónligu menning
- hvussu samleiki hjá menniskjum skapast og mennist
- týdningin av eygleiðingum í dagligdegnum
- týdningin av alheimsgerðini

**Heilsuhjálparaútbúgvingin hevur lærugreinirnar:** Heilsulæru, handaligt fak og virksemi, náms- og sálarfrøði og samfelagslæru. Harumframt almennu lærugreinirnar føroyskt, danskt, enskt og náttúrulæru, ið stuðla undir hinum lærugreinunum í útbúgvingunum.

**Heilsuhjálparaútbúgvingin** byrjar í august í 2009: Longdin er 15 mánaðir og krøvini eru 9. flokkur og 1 ára arbeiðsroyndir ella 10. flokkur. Tað er ein fyrimunur í lærutilgongdini hjá einstaka næminginum at hava arbeiðsroyndir áðrenn. Gevur førleika at arbeiða innan Nærverkið, t.d. heimatænastuna, sambýlir og ellisheim.

**Víðari útbúgvingarmøguleikar: Heilsurøktaraútbúgvingin.** Freistin at søkja er í novembur. Krevur annað umsóknarblað. Gevur førleika at arbeiða innan Nærverkið, Sjúkrahúsverkið og serøkir, so sum t.d. psykiatri, og møguleikar fyri víðari lesnaði. Til ávísar útbúgvingar skal hægri støði takast í almennu lærugreinunum. Tað kann t.d. gerast sum sjálvlesandi.

**Freistin at søkja til heilsuhjálpara í summar er 15. mars 2009.** Samskipað tilmelding er við aðrar miðnámsskúlar. Umsóknir kunnu fáast á heimasíðu skúlans og hjá Mentamálaráðnum, ella við at venda sær til Heilsuskúla Føroya, Kongabrekkan 14, 800 Tvøroyri, tlf. 363850 ella á teldupost heilsuskulin@skulin.fo

Fleiri upplýsingar kunnu fáast á www.heilsuskulin.fo, sum næmingar okkara hava gjørt saman við skúlanum. Heilsuskúlin flytur væntandi í nýggj hølir um stutta tíð.

**Ferðing, stuðul og íbúðarviðurskifti:** Tú ferðast bíligari við strandferðsluni tá tú er lesandi. Kunningar-stovurnar í Suðuroy kunnu vísa á íbúðir til leigu. Ofta leiga fleiri næmingar saman. Næmingar á Heilsuskúlanum hava rætt til stuðul frá Stuðulsstovninum. Lesandi, ið hava børn fáa eyka ískoyti.

Les á heimasíðuni um næmingar, ið hava tikið heilsuhjálpara- og heilsurøktaraútbúgvingina á Heilsuskúlanum: Undir: Eisini fyri menn... Heini er sera glaður fyri sítt val. Hann hevur nú tvær yrkisførleikagevandi útbúgvingar, sum hann hevur møguleika fyri at byggja víðari á. Eisini sigur Heini, at nú hevur hann góðan møguleika fyri at forvinna sær pening sum ískoytið til útbúgvingarstuðulin, tá hann fer undir fysioterapeutútbúgvingina.Heilsuútbúgvingarnar leggja eisini upp til, at ein arbeiðir við sær sjálvum. Hetta hevur verið sera mennandi fyri Heina. Alt, sum hann lærdi um viðurskifti/samskifti millum manna, kann Heini eisini brúka í privatsfæruni.Heilsuskúli Føroya var tað fyri hann, sum hann hevði vónað. Heilsurøktaraútbúgvingin gevur ymiskar møguleikar og tað ber til at finna tað rætta í starvsvenjingunum. Heini hevði møguleika fyri at fylgja fysioterapeutum fleiri ferðir í starvsvenjingini og hetta sannførdi hann um, at fysioterapeutútbúgvingin er rætta yrkið fyri hann.At enda sigur Heini, at um hetta er nakað ein vil, so skal ein ikki halda seg aftur, tí meirilutin av næmingunum eru konufólk. Øll hava verið sera jalig, stuðlandi, hjálpsom og hava gjørt sítt til, at Heini kom ígjøgnum tað, sum hann skuldi.

**Kongabrekkan 14**
**FO-800 Tvøroyri**
**Tel 363850 · Fax 372950**
**www.heilsuskulin.fo**
**heilsuskulin@skulin.fo**

Sosialurin/KvR · 34 18 00